LØGBITI NR. 8

# SINGULER LÓGGÁVA

LÓGARTÆNASTAN

**2. útgáva - oktober 2025**

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 8**

# Singuler lóggáva

Sambært grundlógini § 3, 3. pkt. og stýrisskipanarlógini § 1, 3. pkt. er dómsvaldið hjá dómstólunum. Henda ásetingin setir í ein ávísan mun tað rættarliga markið fyri heimildini hjá lóggávuvaldinum at lóggeva um ítøkilig rættarviðurskifti.

Við dómi frá 19. februar 1999, U.1999.841 H, í sokallaða Tvinddóminum staðfesti Hægstirættur, at ein lóg, sum m.a. hevði við sær, at ávísur statsligur og kommunalur stuðul ikki kundi veitast nøkrum nærri tilskilaðum skúlum, var ógyldug og í stríð við § 3, 3. pkt. í grundlógini. Hægstirættur legði dent á, at lógarinntrivið – hvørs avleiðing var, at skúlarnir vórðu útilokaðir frá rættarkanning av teirra rætti til stuðul – í veruleikanum var ein endalig avgerð av einum ítøkiligum rættartrætumáli.

Harumframt hevur meginreglan um valdbýtislæruna í § 3 í grundlógini og § 1 í stýrisskipanarlógini við sær, at tað eftir umstøðunum eigur at verða víst stórt afturhaldni við at lóggeva um viðurskifti hjá einstøkum likamligum ella løgfrøðiligum persónum (ítøkilig ella "singuler" lóggáva).

Grundarlagið fyri hesum er m.a., at avgerð um rættarviðurskiftini hjá einstaklingum vanliga eigur at vera tikin av fyrisitingini ella av dómstólunum grundað á almennar rættarreglur, sum eru ásettar av lóggávuvaldinum. Ein singuler lóggáva kann tessvegna vera orsøk til týðandi meginregluligan iva og kann eisini lætt bera brá av tilvild hjá lóggávuvaldinum.